# Fyribilsleiðari til frítíðarskúlan

**Søkt verður eftir fyribilsleiðara til Frítíðarskúlan í Tvøroyrar kommunu.**

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 24 børn í 1. og møguliga 2. og 3. flokki. Hann heldur til í hølum hjá Trongisvágs Skúla, í náttúruríkum og barnavinarligum umhvørvi.

**Starvslýsing:**
Talan er um eitt avloysarastarv sum leiðari 40 tímar um vikuna fyri fyribilsleiðara í barnsburðarfarloyvi og leiðara í farloyvi.
Arbeiðstíðirnar eru skiftandi millum kl. 10.00-18.00.
Starvið verður sett í tíðarskeiðnum 15.05.05-31.07.06, ella eftir nærri avtalu.

Bert umsøkjarar við námsfrøðiligum prógvi kunnu søkja starvið.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú ert nærløgd/lagdur
- at tú kanst laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- at tú ert kreativ/ur
- at tú ert før/ur fyri at taka tað fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum.

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála við viðkomandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til býráðsskrivaran tlf. 371085.

Freistin at søkja starvið er 2. mai 2005.

Umsókn saman við prógvum o.ø., verða at senda til

**Tvøroyrar kommuna**
Sosiala nevnd
Postboks 80 · FO-800 Tvøroyri


# KIA Pride

## Árg. '98 · Virði kr. 48.000,-

selist fyri **-40%** kontant

**– TEL 51 96 96 –**

## P.H. Grevstur og lastvognskoyring

**Alt graviarbeiði, so sum havar, tún, garð, parkeringspláss, kloakk og kápilgrøv, verður gjørt við eini 1,5 tons maskinu.**

**Eisini kann tilfar koyrast við einum 7,5 tons bili við 3,5 tons krana og grabba.**

**Tel 210269 ella 743269 ella 443269**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3160,** Sp/f Marconi, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 22.12.2004
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Jákup Elias Sjatlá, 360 Sandavágur (nevndarlimur)
Charles Jacob Olsen, Húsabrúgv 7, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Jonna Miriam Magnussen, Spógvavegur 47, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Hanna Kristel Haraldsen, Tórugøta 24, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
Innkomin í nevndina: Kristbjørg Sunnleyg Petersen, Jørundargøta 50, 188 Hoyvík (nevndarformaður)
Oddvør Brøðraberg, Gundadalsvegur 26, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Jóanes Brøðraberg, Jørundargøta 56, 188 Hoyvík (nevndarlimur)
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Jákup Elias Sjatlá, 360 Sandavágur
**Innkomin sum stjóri:** Jóanes Brøðraberg, Jørundargøta 56, 188 Hoyvík
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóra saman við nevndarformanni ella av tveimum nevndarlimum.
**Grannskoðari:**
**Farin frá sum grannskoðari:** P/F Grannskoðaravirkið Inpact, statsaut. revisorar, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn
**Nýggjur grannskoðari:** Sp/f SPEKT, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 13. apríl 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2696,** P/F Zenit, 110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 13.02.2003
**Hjánøvn:**
**Nýggj hjánøvn:** P/F Netmiðlan (P/F Zenit), P/F Miðlan (P/F Zenit), P/F Netteki (P/F Zenit), P/F Teki (P/F Zenit)
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Jón Martin Højsted, Gróthúsvegur 1, 188 Hoyvík (nevndarlimur)
**Innkomin í nevndina:** Christian Nagata, Millum Gilja 58, 188 Hoyvík (nevndarlimur)

Skráseting Føroya
tann 13. apríl 2005

Kristin Balle

---

# Posthúsleiðari

**til posthúsið heima á Sandi**

## Starvslýsing
Søkt verður eftir posthúsleiðara til posthúsið heima á Sandi at byrja skjótast gjørligt. Talan er um knapt 3/4-tíðar starv. Arbeiðstíðin er partvís fyrrapartar, tó størsti parturin seinnapartar, mánadag - fríggjadag.

## Ábyrgd
Tú fært ábyrgdina av postvirkseminum á økinum undir posthúsinum heima á Sandi.

## Førleiki
Ynskiligt er, at tú hevur royndir innan postavgreiðslu, aðra hóskandi handilsliga útbúgving ella ert til reiðar at fara undir eina slíka.

## Eginleikar
Tú skalt hava góð samstarvsevni, verða bæði heildarorienterað/ur og úrslitssøkjandi og dáma væl avbjóðingar.

## Løn
Løn eftir sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

## Umsókn
Freistin at senda inn umsókn er 1. mai 2005

Skrivlig umsókn skal stílast til:

**Postverk Føroya**
**Postboks 3009**
**110 Tórshavn**

Postverk Føroya

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3343,** Sp/f Con-Trade, 100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 03.03.2005
**Navn:**
**Nýtt navn:** Sp/f Føniks
**Partapeningur:** Hækking við kr. 160.000,00 til kr. 240.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 160.000,00 til kurs 200.
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:** Niclas Joensen, Kálvagerði 1, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
Jón Danielsen, Folagerði 1, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Alfred Hummeland, 430 Hvalvík (nevndarlimur)
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av allari nevndini, av tveimum nevndarlimum saman ella av einum nevndarlimi saman við einum stjóra.

Skráseting Føroya
tann 13. apríl 2005

Kristin Balle

---

# Lærarar

til HT, SIT og yrkisútbúgvingar innan handverk verður søkt eftir undirvísarum til lærugreinirnar:

- Føroyskt, A-, C- og E-stig, íalt 26 tímar/viku
- Enskt, C- og E-stig, 4-8 tímar/viku

Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið. Skúlaárið byrjar 15. august.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum innan 12. mai.

Eru spurningar, so kunnu áhugað venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Tekniski skúlin í Klaksvík**

# Partabræv í P/F Moyggjartúgvu

Eitt partabræv við nominellum virði kr. 10.000,00 í P/F Moyggjartúgvu til sølu til hægstbjóðandi.

Áhugað kunnu venda sær til undirritaða.

**Demmus Hentze, lrs.**
Bringsnagøta 23 · 100 Tórshavn
Tlf. 311460

veitst tú ikki tað?